# Betong skapar eisini bleyt virðir

## Landsverk søkir eftir verkfrøðingi til vegadeildina og verkfrøðingi/ byggifrøðingi til framleiðsludeildina

Hørðu virðini sum vegir, tunlar og brýr eru á mangan hátt ein fyritreyt fyri at kunna røkja bleytu tænasturnar í samfelagnum. Vilt tú útbyggja og viðlíkahalda samfelag okkara á báðum hesum økjum, hevur tú møguleikan nú.

**Høvuðsarbeiðsøkið á vegadeildini**
- seta á stovn og hava dagligu leiðsluna av holdi til viðlíkahald av tunlum og brúm
- seta á stovn og menna eina vælvirkandi viðlíkahaldsskipan til landsvegakervið
- hava dagligu leiðsluna av holdi, sum hevur vegauppmerking um hendi
- luttaka í ráðlegging og gransking á deildini, serliga við atliti at tunlum og brúm

**Høvuðsarbeiðsøkið á framleiðsludeildini**
- gera kostnaðarmetingar og eftirkalkulatiónir av asfalt- og anlegsarbeiðum
- skipa fyri viðlíkahaldi av skervverkunum kring landið og asfaltverkinum í Hundsarabotni

**Førleikakrøv**
Starvið á vegadeildini krevur verkfrøðingaprógv, og fyrimunur er at hava royndir á nevndu økjum. Starvið á framleiðsludeildini krevur verkfrøðinga- ella byggifrøðingaprógv. Í báðum størvum verður dentur lagdur á góð samstarvsevni, sjálvstøðugt arbeiðslag, teldukunnleika á brúkarastigi, framfýsni og evni at menna arbeiðsplássið saman við starvsfeløgunum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.



**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella til Landsverk, postsmoga 78, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2008. Merk umsóknina „starv á vegadeild" ella „starv á framleiðsludeild." Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Heina Eysturoy, vegadeildin, tlf. 540 881, he@lv.fo ella til Torkil Olsen, framleiðsludeildin, tlf 540 841, to@lv.fo.

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

SENDISTOVAN

# Barnsburðaravloysari til telefonavgreiðsluna hjá Føroya Tele á Tvøroyri

*"Eingin framtíð er í starvinum, framtíðin er í starvsfólkinum"*

\- George Crane -



Søkt verður eftir barnsburðaravloysara til telefonavgreiðsluna hjá Føroya Tele á Tvøroyri at byrja sum skjótast.

**Arbeiðið**
- Øll vanlig telefonavgreiðsla
- Fyrispurningar frá viðskiftafólki
- Avgreiðsla av tænastum

**Umsøkjarin**
- Tú hevur hug og førleika til kundatænastu
- Tú dugir at seta teg inn í nýggja tøkni
- Tú hevur góð evni at samstarva í toymi og við ymiskar starvsfólkabólkar
- Tú ert íðin at røkka ásettum málum
- Tú hjálpir, har tað er neyðugt
- Tú avgreiðir mál skjótt og væl

Handilin hjá Føroya Tele á Tvøroyri er ein av seks handlum kring landið, og telefonavgreiðslan á Tvøroyri avgreiðir uppkall til allar seks handlarnar.

Telefonavgreiðslan á Tvøroyri er opin allar vanligar handilstíðir, og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í telefonavgreiðsluni.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Fleiri upplýsingar fáast hjá Niels Hammer á tel. 303481 ella á Starvsfólkadeildini á tel. 303030.

Umsóknir skulu vera FøroyaTele í hendi í seinasta lagi týsdagin 5. februar 2008, og tær skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
ella starvsfolkadeildin@ft.fo

**Handlarnir hjá Føroya Tele eru skipaðir undir FT Samskifti, sum er dótturfelag í samtakinum Føroya Tele. FT Samskifti hevur um hendi alla kundarøkt, sølu, alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og alla støðarútgerð til fastnetstelefoni og breiðband. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele. 105 fólk starvast hjá FT Samskifti.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*